


### Elieser Jacobsen:

# Tann gloymdi stjórin í sparikassanum

**Tá ið navnið Elieser Jacobsen verður nevnt í Havn verður vanliga hugsað um handilin hjá Essaba, har Kafé Natúr er nú. Í gamla kirkjugarði er ein annar meira ókendur Elieser Jacobsen grivin**




**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo


Tað er ikki nógv sum er vitað um hendan Elieser. Í bókini Eikirøtur hjá Zakarias Wang er nevnt, at hann var stjóri/stjórnarlimur frá 1903-1923. Annars er hann ikki nevndur. Tað eru tvær myndir í bókini, har Eliesar er á. Hann hevur verið við í sparikassaleiðsluni saman við so kendum persónum sum Olaf Finsen, Jacob Lützen, Fríðrik Petersen, C.C. Danielsen og politikkaran Oliver Effersøe. Hesa tíðina hevur tað neyvan verið fulltíðarstarv at vera stjóri. Tað er í tíðini hjá Elieser, at sparikassin fekk grótbygningin í miðbýnum, har hann enn heldur til.

**Var íðin sjálvstýrismaður**

*Tað eru minningarorð um Elieser í Tingakrossi í samband við hansara 80 ára føðingardag í 1923, har tað verður sagt:*

"Í gjár fylti ein hin best kendi borgari her í staðnum tann meira sjáldsama aldur nú á døgum, 80 ár. Tað er Elieser Jacobsen, ið enn ber seg stinnur á fótum og andsrørligur, tó sjúka á gamalsaldrinum hevur tikið honum so hørð tøk.

Elieser Jacobsen hevði sum unglingur avgjørdan hug til sjógvin, men hann kom kortini á fútakontórið til Finsen og var har í 15 ár. Síðan var hann í heili 25 ár við handilin, kom so aftur á embætiskontór og var á amtskontórinum í 21 ár. Í 20 ár sat hann í sparikassastýrinum. Var í mong ár kommunukasserari og limur av skúlakommissiónini.

Alla sína tíð hevur Elieser verið ein sjáldsama interesseraður maður, eldhugaður politikkari, fríheitsmaður í Schrøters tíð og seinni av trúgvastu sjálvstýrismonnum. Søguligan ans hevði hann átt fram um tey flestu, og er hann nú ein av teimum fáu, sum leitast kann til um upplýsingar og frásagnir frá gomlum døgum."



*Hetta er Pramm, sum er umrøddur í greinini. Teknaður av William Heinesen*

**Ættaður av Húsagarði**

*Um ættina hjá Elieser kann sigast:*

Abbin var Jacob Christiansen (1761-1829), bóndi á Eystara Húsagarði, hann festi í 1799. Omman var Ellen Elisabeth Justdóttir Karbech (1776-1851). Tey giftust í 1798 og fingu átta børn. Ein sonur var Hans Christoffer Jacobsen, sum var pápi læraran Jakob Jakobsen, sum vit umrøddu fyri kortum. Ein beiggi var gamli Júst á Húsum, abbi tann Just Jacobsen, sum var við til at kalla inn til jólafundin í 1888.

Ein beiggi var Daniel Pauli (1806-1872) giftur við Catrinu Mariu Debes (1810-1886). Tey áttu Elieser. Ein systir hansara var Marianna, sum giftist við bakar Hansen. Tað verður sagt, at tey búðu saman, og at Elieser, sum var ógiftur, kann hava átt húsini, har tey búðu. Hetta var aftanfyri Hotel Hafnia



*Stásiligi nýggi sparikassin varð bygdur í 1905 í stjórnartíðini hjá Elieser Jacobsen*



*Manningin í sparikassanum í 1911. F.v. Adrian Øster, kassameistari, C.C. Danielsen, stjóri, Johan Danielsen, bókhaldari, Christian Helms, sorinskrivari, stjórnarlimur og Elieser Jaobsen, stjórnarlimur*



*ELIESER JACOBSEN*
*F. 3. JULI 1843*
*D. 2. JULI 1926*



*Bóndagarðurin á Húsum var í Bringsnagøtu. Nú er hann fluttur til Mexico, har henda myndin er tikin*

**Bondens hus**

*Ættin á Húsum var sera stór, og tí kann tað vera áhugavert at endurgeva lýsingina hjá Carolinu Heinesen, mammu William, av hesi ætt:*

Ved siden af Kjelnæs boede byens eneste bonde, jeg kendte dem i 5 slægt led. Den ældste Just Jacobsen (f. 1801) var allerede en gammel mand, da jeg huskede ham. Han var lille og krumbøjet, men arbejdede som en yngre mand. Jeg så ham engang stå og værge sig mod en rasende gase, som slog ham med vingerne, men han havde godt kræfter trods sin høje alder. Den næste bonde var Jacob Jacobsen, (1825-1887) som jeg husker mindst til. Han døde temmelig ung, han var en høj og kraftig mand. Så kom Just Jacobsen (1860-1932), som hele byen kendte. Han var vist en meget dygtig og flittig mand, beleven og elskværdig. Han havde kun en datter, da hans kone døde et år efter, at de var gift. Datterens søn hed også Just og var en lovende og dejlig dreng, men han døde allerede i 14-års alderen. Gamle madam Jacobsen var søster til Hans Christoffer Olsen, hun var som alle de søskende lille og vindtør. Hun holdt meget af at høre nyt. Når efteråret begyndte, blev der lavet en vældig høstak lige udenfor vore vinduer. Dengang havde de intet høhus, og alle nabofolkene hjalp med at bære hø. I oktober kom så alle slagtelammene hjem, og de lå udenfor huset til stor glæde for os børn.

**Pramm**

Gamle madam Jacobsen havde en broder der hed Pram, som var lille og krum, begge benene var næsten lammet. Han gik med krykker, og han var lappeskomager. Om sommeren sad han udenfor på en lang bænk og arbejdede. Han var meget morsom og vittig og altid i godt humør. Børnene omringede ham altid og han spurgte os om alt muligt, men om vinteren lå han inde i sengen og arbejdede i et værelse ved siden af køkkenet. Nu lavede de sådan nogle dejlige brystsukker deroppe, som de solgte til 1 øre stykket. Alle de penge vi fik som børn, gik til de brystsukker. Det var Pram som lå i sengen, der solgte dem. Et lille bord med en dåse med brystsukkerne stod ved siden af hans spyttekrus, men det generede os ikke. Det kan have været tuberkulose han led af, men der var ingen af os, der belv syge. Vi stod gerne og hostede i gangen for at tilkendegive, at vi var der. Så hørte vi "hvem er derude?" "Det er mig" "Hvad for en mig? kom ind!", og så blev der jo et helt krydsforhør over alt muligt. Ham havde vi megen fornøjelse af, men så blev han jo så syg og kunne ikke arbejde mere. Men det var et utroligt humør, der sad i den skrøbelige mand.

Til bondegården hørte der bl.a. et sodnhus, hvor de tørrede kornet. Det stod oppe på Tinghusvejen. Der var så en kone, der havde tilsyn med kornet, og deroppe samledes så hele husegårdsbørnene, og der fik vi kartofler stegte i asken, det var en lækkerbisken. Mens de stegte, sad vi og hørte på historier, som den gamle kone fortalte, hun blev kaldt Rikke i Kina. Hun har ingen familie mere her i byen. En datter, som er gift i København, var heroppe i sommer. De aftner vi tilbragte i sodnhuset er noget af det hyggeligste, man kunde tænke sig.

**Komandi partur**
Í komandi parti verður greitt frá Jacob Kjelnæs, sum arbeiddi í 43 ár hjá T.F. Thomsen á Tvøroyri